# ur gullbrúdleyp





*Nú leygarkvøldið 4. apríl hátíðarhalda Emma og Harry Hansen gullbrúdleyp fyri 250 fólkum á Svangaskarði*

hana. Eg kundi jú ikki stjala hana. Soleiðis var tað tá. Tað var seint á kvøldi. Eg bankaði á dyrnar og stóð har so reyður og smæðin í gongini, tá gamli kom oman trappurnar. Men hann var so sjelablíður og bjóðaði mær inn, og so var alt í lagi, sigur Harry.

Men lógin segði, at maðurin skuldi vera 21 og førur fyri at forsyrgja einari familju, skuldi hann sleppa at giftast.

- Men eg forvann góðar pengar í fiskiskapi og vit høvdu sum sagt skund. Tí fekk eg skiparin at skriva undir upp á, at eg kundi forsyrgja einari familju. Og so sluppu vit at giftast.

5. apríl 1959 var brúdleyp á Toftum. Og 1. november sama ár kom fyrsta barnið, og eftir trimum árum vóru húsini longu niðurgoldin.

Tilsamans komu fýra ungar í reiðrið hjá Emmu og Harry. Tríggir dreingir og ein lítil didda, sum tey tíverri mistu, tá hon var bara fáar mánaðar gomul. Tað var største sorgin í samlívinum hjá teimum báðum, sum í ár hava verið gift í fimti ár.

Men soleiðis er lívið sjálvandi, tá vit koma upp í árini saman, eins og Emma og Harry: Ein felags ferð, við góðum og minni góðum upplivingum.

Tí kunnu tey eisini sita her so hugagóð í sofuni í dag, og minnast aftur á eydnuríku ungdómsdagarnar, tá tey bæði funnu saman.

